# Til sølu



Vælútgjørdur glasfipur útróðrarbátur við veiðuloyvi.

**Tlf. 444324 ella 258909**

## Norðstreymoyar Javnaðarfelag

# Uppstillingarfundur

1. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í Bjargingarfelagshúsinum í Kollafirði **sunnudagin 10. februar kl. 20⁰⁰.**

**Nevndin**

# Pedagogur og hjálparfólk

Søkt verður eftir einum pedagogi 40 tímar um vikuna, at byrja 01.04.2002. Starvið er tíðaravmarkað til 31.12.2002 (fyri pedagog, ið er í barnsburðarfarloyvi).

Søkt verður eftir einum hjálparfólki 40 tímar um vikuna, fyri hjálparfólk, sum er í farloyvi frá 01.03.2002 til 28.02.2003.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3 – 7 ár, býtt sundur í 3 stovur.

Á hvørjari stovu starvast tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúruumhvørvið saman við børnunum.

Løn og seturnartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsøkn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 22.02.2002 kl. 12⁰⁰.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO–100 Tórshavn

# Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir pedagogi/starvsfólki til Føroya Barnaheim at byrja 1. mars 2002 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv á ungdómsdeildini, Nýggjustovu. Arbeiðstíðin er skiftandi og fevnir um alt døgnið.

Nýggjastova er normerað til 6 ungfólk í aldrinum 12 – 18 (20) ár, umframt 2 bráfangis pláss.

Arbeiði krevur, at tú er før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við foreldur, skúla og onnur.

Uppgávurnar eru fjølbroyttar og verða settar út frá tørvinum hjá tí einstaka barninum/tí unga.

Barnaheimið bjóðar eitt mennandi, krevjandi og áhugavert starv, við møguleika at luttaka á faklig-um skeiðum.

Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum og viðmælum skal sendast til: Stýrið fyri Føroya Barnaheim, Pedda við Steinsgøta 10, FO-100 Tórshavn, att.: Fríða Patursson, innan 22.02.2002.

Viðkomandi, ið settur verður, verður lønt/ur sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til virkandi leiðara Mirjam Johannesen á tlf. 312320.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10 • FO-100 Tórshavn
Tlf: 312320 • Faks: 311886 • T-postur: fbh@post.olivant.fo

# Hjartafelagið

Aðalfundur felagsins verður týsdagin 26. februar 2002 kl. 19.30 á Landsbókasavninum.

Skrá samb. lógum felagsins.

Mál, sum limir vilja hava til viðgerðar á aðalfundinum, mugu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar fyri fundin.

Á fundinum heldur Ingelise Sørensen, fysioterapeutur, fyrilestur um heilsu og ítkan.

**Nevndin**
Hjartafelagið,
Postboks 3120,
110 Tórshavn

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til

# umboðsmannaval

í Sjúkrakassanum fyri Skála Læknadømi tann 12. mars 2002.

2 umboð fyri Skála kommunu skulu verða vald.

Uppskot við minst 4 valevnum skulu vera sjúkrakassanum í hendi innan 4. mars.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur · tlf. 449212

# Útbúgvingarferð fyri handverkslærlingar

Í samstarvi við Aberdeen College, Tekniska Skúlan í Klaksvík og Tekniska Skúlan í Tórshavn skipar Oljuútbúgvingarsamtakið fyri útbúgvingarferð til Aberdeen.

**Endamálið við ferðini er m.a., at:**
- handverkslærlingar fáa innlit í viðkomandi oljuútbúgvingar
- skapa størri samstarv millum føroyskt vinnulív/skúla og vinnulív/skúla í Aberdeen

**Luttøka og treytir:**
- 10 handverkslærlingar fáa høvi at luttaka
- er galdandi fyri allar lærlingar, sum í viðkomandi tíðarskeiði ikki eru í skúla
- lærlingar innan el-, maskinsmíð og smiðjuyrkini
- lærlingarnir skulu hava staðið í læru í minsta lagi 2 ár
- læruplássið innskrivar lærlingi til luttøku

**Tíðarskeið:**
- fráferð verður 18. mars og heimkoma 25. mars
- innskriving í seinasta lagi hósdagin 21. februar

**Innskrivingarbløð fáast við at venda sær til:**
- Tekniska Skúlan í Klaksvík tlf. 456311
- Tekniska Skúlan í Tórshavn tlf. 311957

Oljuútbúgvingarsamtakið rindar allar útreiðslur (ferð, trygging og uppihald) í sambandi við útbúgvingarferðina.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík • Tekniski Skúlin í Tórshavn**

# Hús til sølu

Eldri sethús á Sandi til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 227019 ella 423529**

# Føroya Fornminnissavn

**Framsýningin hjá Føroya Fornminnissavni**
í Brekkutúni 6 er afturlatin fyri almenninginum, meðan arbeitt verður at leggja nýggjar trygdarskipanir inn.

Væntandi verður latið upp aftur í mai.

**Føroya Fornminnissavn**
Kúrdalsvegur 2, Hoyvík,
Postboks 1155, FO-110 Tórshavn,
tlf. 310700, fax 312259,
e-mail: fornminn@natmus.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðlar søkjast til Bridgehúsið

Bridgehúsið er eitt frítíðartiltak undir Stuðulsfólkaskipanini í Tórshavnar kommunu.

Stuðul søkist til 17 ára gamlan seinmentan drong við autistiskum trekkum, sum í løtuni gongur í frítíðartiltakinum Bridgehúsinum eftir skúlatíð, men sum í summar skal hava eina meiningarfulla og vælskipaða viku uttan hetta frítíðartiltak.

**Uppgávan**
- at vera stuðul og fyriskipa omanfyri nevnda umskifti í samráð við foreldur, Stuðulsfólkaskipanina og Almannastovuna.
- at koma at kenna drongin í Bridgehúsinum og arbeiða móti
- at sleppa hesi basuni móti sumri.
- at stuðla honum í at gerast meiri persónliga sjálvstøðugur, sum t.d. at fara í bað og vaska sær, lata seg í, gera sær ein drekkamunn og brúka møguleikarnar býurin bjóðar.

Arbeiðstíðin er ca. 20 tímar um vikuna, seinnapartar og kvøld.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarin:
- hevur royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið
- hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum, ið hava trupulleikar
- er búgvin, torir at tosa um forðingar í arbeiðinum og er opin fyri menning í arbeiðnum
- er sjálvstøðugur og dugir at skipa sær arbeiði.

**Starvs- og setunarviðurskifti**
Stuðulsfólkaskipanin skipar fyri ráðgeving til Almannastovan yvirtekur í summar. Tá skift verður frá Bridgehúsinum til heimið, flytir setanin frá Stuðulsfólksskipanini í Tórshavnar kommunu til Almannastovuna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

**Stuðlar søkjast eisini til:**
- 11 ára gamla gentu 25 t. arb.tíð frá 11.30 til 17.00
- 8 ára gamlan drong 20-25 t. arb.tíð frá 11.30 til 17.30

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara í Stuðulsfólkaskipanini ella Jákubinu Hansson, pedagogiskan ráðgeva. Tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi sum skjótast ella í seinasta lagi 22. febr. 02. Viðmerk umsóknina " Stuðulspedagogur"

SNARSKIVAN

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktina í Tvøroyrar kommunu at byrja skjótast gjørligt.

Tú skal hava hug at arbeiða við børnum og geva teimum ein tryggan og fjølbroyttan dag, og tú skal duga at samskifta við foreldrini.

Áhuga kunnu ringja til dagrøktarskipanina í Tvøroyrar kommunu við Súsannu Poulsen, tlf. 371339.

Tvøroyrar kommuna

## Mentamálastýrið
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# UNITED WORLD COLLEGE

Red Cross Nordic United World College Foundation bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið er liðugur í 1. studentaskúlaflokki á sumri 2002, at taka IB (IB merkir International Baccalaureate, og er hetta eitt altjóða studentsprógv, ið gevur somu rættindi sum eitt føroyskt studentsprógv), eftir 2 árum á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Dale liggur umleið 100 km norðan fyri Bergen.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og verður hetta m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 70 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

Stuðulsstovnurin rindar - eftir umsókn - skúlagjaldið, og næmingurin, ið fer á United World College, fær útbúgvingarstuðul frá Stuðulsstovninum eftir somu treytum, sum studentaskúla-næmingar í Føroyum.

Nærri upplýsingar um skúlan fáast við at venda sær til Mentamálastýrið ella til lestrarvegleiðingina á studentaskúlunum.

Umsókn um upptøku á Red Cross Nordic United World College, ljóstak av støðumetan og stutt frágreiðing um teg sjálva/n skulu vera Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 8. mars 2002. Gjørt verður vart við, at einki umsóknarblað finst.

**9. februar 2002**

**Mentamálastýrið**
Postrúm 3279 • 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 • Telefax 35 50 55

## Almanna- og Heilsumálastýrið
*Starvsfólkadeildin*

# Avloysari fyri fulltrúa í barnsburðarfarloyvi

**Starvið:**
Eitt starv sum avloysari fyri fulltrúa í barnsburðarfarloyvi verður leyst til setan í Almanna- og heilsumálastýrinum skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu og til 31. december 2002 .

Høvuðsuppgávur hjá fulltrúanum eru:
- Ráðgeva aðalstjóra og deildarstjórum
- Gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð

**Førleiki:**
Vit hugsa okkum at tú hevur, ella fær í næstum, útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú cand.jur., cand.polit, cand scient.pol., cand. scient adm. ella líknandi, og hevur góðan kunnleika til mál og til edv.

Av tí at tann, sum avloysast skal, mest hevur arbeitt innan almannaøki, er ynskiligt, men tó ikki krav, at tú hevur vitan/royndir innan sosialpolitikk.

Harumframt at tú hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða:**
- Starv, sum til tíðir er strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við skiftandi uppgávum.
- Flex tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeiðmøguleikar.

**Lønar-og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal at setanin umfatar Almanna- og heilsumálastýrið og stovnar undir tí, umfram løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almanna-og heilsumálastýrið**
Postboks 64
110 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 25. februar 2002 kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.

*Almanna- og heilsumálastýrið hevur um hendi málsøkini: Almannamál, heilsumál, apoteksmál, íbúðarmál og ávís arbeiðsmarknaðarmál, harundir m.a. javnstøðumál.*
*Í Almanna- og heilsumálastýrinum starvast í løtuni 9 fulltrúar. Aðalstýrið er skipað í 4 eindir: aðalskrivstovu, almannadeild, heilsudeild og lønar- og starvsfólkadeild.*